# TILTØK

**Kirkjukjallarin, Gøta**
Hugnaløta fyri tey ungu verður leygarkvøldið kl. 21.00. Møtið fjølment.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, Barnakórið venur aftaná. Kl. 18.00 verður Thabor-fundur.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Snorra Brend, evni »Hvussu skal ein trúgvandi fyrihalda seg til rúsdrekka«. Magni Christiansen syngur og innsavnan verður til Bláakross. Ungdómsmøti verður kl. 21.00 við Àsbjørn Bertelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Skúlin við Òsánna, Klaksvík**
Mánakvøldið kl. 20.00 Ein tíma við bíbliuni. Terje Gravningen og Erik Lund.

**Missiónsvikan í KFUM & K, Klaksvík**
Hósdagin kl. 19.30 Møti, Alfred Olsen talar, Elsa Maria, Mariann og Sóleyð syngja.
Fríggjadagin kl. 19.30 Møti, Heri Elttør talar, Òli, Sólfríð og Gudrum syngja.
Leygardagin kl. 10.00 Kaffi, te og rundstykkir, Bíbliutími við Hera Elttør, kl. 19.30 møti, Heri Elttør talar. Streingjakórið í KFUM & K syngur, kl. 22.30 Ungdómsløta, Heri Elttør talar, Lovsangsbólkurin syngur, Drama verður framført.
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta í Christianskirkjuni, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti, Heri Elttør talar, Barnakórið syngur, Marta og Tummas Pauli Mýru syngja. Innsavnan til húsið, kl. 21.00 Eftirmøti, Tey ungu syngja.
**Barnaansing fyri børn undir skúlaaldri.**
**Bønarløta er hvørt kvøld 1/2 tíma áðrenn møtið byrjar.**
**Frá mikukvøldinum verður boðið til kaffi aftaná møti.**
**Boðið verður til samtalu og/ella forbøn. Ynskja tygum bil til møtini, eru tit vælkomin at ringja 457425.**

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Hendrik Olsen. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti. Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við Deboru Bringsberg og André Matras og ung vitna.
Leygarmorgun kl. 10.00 Bøn og kl. 21.00 Ungdómsróp.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Mánadag til fríggjadag kl. 6.15 er Morgunbøn. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 26. november kl. 15.00 giftast í Vestmanna kirkju Sóley Mikkelsen av Skála og Jógvan Sigurd Poulsen, Vestmanna. Vælkomst verður á Fjørukrónni frá kl. 20.00. Sama dag broyta hjúnini eftirnavn til Hórðará.

Leygardagin 26. november kl. 15.00 giftast í Skopunar kirkju Molly Elisa Torbjørnsdóttir Jacobsen og Sjúrður Højgaard. Veitslan verður hildin í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 361805, 361119, 582058, ella 447215 áðrenn 19. november.

Leygardagin 10. desember kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju, Bodil Simonsen, Saltangará, og Petur Súni Jacobsen, Leirvík. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443176, 448051 ella 225941 áðrenn 28. nov.

Leygardagin 10. desember kl. 14.00 giftast í Saron á Viðareiði Òluva Fuglø, Norðdepil og Markus Hvannastein, Viðareiði. Opið hús verður í Norðdepli hjá foreldrunum kl. 20,00, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

Leygardagin 10. desember kl. 14.00 giftast í Kelduni í Skálafirði, Dávid í Lág, Strendur og Theresa Sevdal, Runavík. Eftir vígsluna verður reseptión í Kelduni, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 10. desember kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju, B odil Simonsen, Saltangará og Petur Súni jacobsen, Leirvík. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443176, 448051 ella 225941 áðrenn 28. november.

Leygardagin 17. desember giftast Frida Sigmundsdóttir og Eddie H. Joensen, Kollafjørður. Vígslan verður í Adventistakirkjuni kl. 13.00. Opið hús verður í bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 421025, 50668 ella 580461 áðrenn 3. desember.

Leygardagin 17. desember kl. 12.00 giftast í Nes kirkju Dorith Æðustein Poulsen, Havn og Niclas Allan Danielsen, Toftir, eru búsitandi í Rituvík. Veitslan verður hildin á Svangaskarði kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 449074 ella 749074 áðrenn 8. desember.

**Silvurbrúdleyp**
Leygardagin 10. desember kunnu hjúnini Malan og Kristian Hansen í Nólsoy halda silvurbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 327112 ella 580273 áðrenn 1. desember. Byrjað verður á Flakavirkinum við døgurða kl. 19.30.

Týsdagin 10. januar hava Anita og Tummas Pauli Olsen, Syðrugøta, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 7. januar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleyp verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 441795, 213912 í seinasta lagi 14. desember.

**Gullbrúdleyp**
Tann 4. desember hava Gertrud og Martin Gunnarstein í Vági gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin á gistingarhúsinum í Øravík leygardagin 3. desember. Tey, ið vilja halda dagin saman við gullbrúðarparinum, kunnu siga frá á tlf. 373358 ella 373980 innan 20. november.

Sunnudagin 4. desember hava Karla og Elias Olsen, Rituvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Sjókaféini í Runavík sunnudagin 4. des. kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í gullbrúdleyp, kunnu siga frá á tlf. 449455, 448455 ella 263300, innan 27. nov.

Leygardagin 31. desember hava Sunneva og Henning Johannessen á Argjum gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum fríggjadagin 30. desember kl. 19.00. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum hetta kvøldið, verða biðin um at siga frá á tlf. 315005 ella 313269 áðrenn 1. desember.

**Diamantbrúdleyp**
28. november hava Elly og Frederik Joensen í Vági diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 26. november kl. 16.00-20.00 í hølunum hjá Frelsunarherinum í Vági. Øll, ið vilja gleða diamantbrúðarparið eru vælkomin.

**50 ár**
Tann 7. desember verður Jógvan Nybo, Viðareiði 50 ár. Dagurin verður hildin við vælkomst fríggjadagin tann 2. desember kl. 19.30 á Viðareiði. Vinarliga sigið frá á tlf. 45093/222450 áðrenn 1. desember.

**80 ár**
Mánadagin 12. desember verður Bjarni Samuelsen, Tvøroyri, 80 ár. Dagurin verður hildin á Hotel Tvøroyri sunnudagin 11. des. kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Bjarna við at koma í føðingardag verða biðin um at siga frá á tlf. 371319 innan mánadagin 5. desember.







Hvønn mikudag og leygardag fram til 23. nov. verður kappingin í blaðnum. Fleiri seðlar, geva størri møguleika at vinna. Drigið verður í Miðlahúsinum 26. november kl. 14, har Trøllapætur, Nósi og Kular Røtur eisini luttaka.

VINN EINA KULA FERÐ
VIÐ ATLANTIC AIRWAYS
+ Kular Røtur savnsfløgur og sangbøkur

Vinningar:
Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við Atlantic Airways
10 Kular Røtur savnsfløgur
10 Kular Røtur sangbøkur
10 Jólini hjá Trøllapætur

Nósi
Atlantic Airways MBM Postverk Føroya

Tað var einaferð
1. Átti kongurin ein son?
2. Hvør royndi til seinast at fáa prinsessuna?
3. Hvat gav hann henni?
Navn:
Bústaður:
Send til: Kular Røtur • Sosialurin • postboks 76 • 110 Tórshavn, innan 25. nov.

www.kularrotur.com